# Embalaga til fleiri endamál

Í skápinum stóðu stakkar av tómum plantumargarinpakkum til at frysta fiskamat við soði í. Til dømis knettir og frikadellur. Og mjólkarpakkar til grind og náta. Pappírið til vitamargarin varð lagt undir bakstur ella at smyrja breyðskuffurnar við. Hetta ber ikki til í dag, tí tilfarið er øðrvísi.






# Stoppaðu hvørt eitt hol

Hosurnar vórðu stoppaðar fleiri ferðir, áðrenn nýggjur leistur varð bundin undir.

## Betri góðska

Góðskan var ein heilt onnur, og tey fóru sera væl við tingum og klæðum. Alt var dýrari í mun til í dag. Øll góð klæði blivu handfarin sum føroysk klæði, og skuldu til dømis ikki liggja í botninum á skititoyskurvini og slitna. Træmøblarnir vóru massivir og útskornir. Eisini keypti man ein frakka fyri lívið – tað hevði ikki komið fyri í dag. Einaferð keypti mamma eina spadserudragt, sum hon hevði spart upp til. Eg haldi, at hon kostaði eina heila mánaðarløn. Hon helt í fleiri harrans ár, og er til denna dag.

## Teposar til síðsta dropa



Mamma brúkti teposarnar fleiri ferðir. Eg havi upplivað, at hon fór í ruskspannina eftir einum teposta, sum bara hevði verið brúktur einaferð.

## Polstraðu møblarnar

Mamma og tey polstraðu møblarnar um, tá teir blivu slitnir. Teir eru til enn. Alt hevði eina søgu, til dømis: »Tá pápi kom heim av fiskiskapi við einum gólvteppi«. Ella: »Tá mamma fór til Havnar at keypa dagligstovumøblarnar«. Eisini høvdu vit ein skenk úr Bretlandi, sum er til enn.

## Breyðsuppa við eggjasnapsi og róma

Maturin hjá mammu var ómetaliga góður. Breyðrestir vórðu goymdar, frystar niður og brúktar til breyðsuppu. Vit høvdu bæði hønir og kúgv. So pískaði hon ein søtan eggjasnaps at koyra á heitu breyðsuppuna, saman við friskum pískaðum róma.

## Mjølsekkir til øll endamál

Mamma keypti sekkir við mjøli í frá heilsølum. Sekkirnir vóru úr góðum lørifti og vórðu brúktir til klútar og koddavár.

## Merkiseðlar úr tepakka

Tá tepakkin var tómur, klipti hon hann sundur til merkiseðlar at seta á frystivørurnar.

## Vendi flippunum

Flippan varð tikin av skjúrtuni, vend og seymað á aftur. So var skjúrtan aftur sum nýggj.

## Skola kaffifiltur

Tað kom meiri enn so fyri, at mamma skolaði kaffifiltur og brúkti tað umaftur!

## Hárliting til fleiri ferðir

Mamma deildi altíð dunkarnir við hárliting, so teir kundu røkka til fleiri litingar.

## Gávupappír

Gávur vórðu pakkaðar inn í avísir ella teknirøðir. Gávupappír og bond vórðu goymd og endurnýtt.

## Einfalt vask

Alt bleiv vaskað við grønsápu ella Sunlight sápu. Bæði hús og fólk.




## Vaskaði plastposar

Hvør einasti plastposi varð vaskaður, hongdur upp á snórin og brúktur aftur. Til dømis breyðposar.

## Lappar úr restum

Bummulsrestir vórðu brúktar at binda eygnalappar og borðlappar við, og slitin undirklæði, løk og handklæðir vórðu skrødd sundur til lappar.

